Fylgiskjal 9

Kommunufelagið

Løgmansskrivstovan
Tinganes
Postrúm 64
110 Tórshavn

24. januar 2019

Okkara j. nr.
19/00021-2

Málsviðgeri
Jóhan Lamhauge

Tygara j. nr.
0617-008/18

**Viðv.: uppskoti til broytingar í revsilógini**

Kommunufelagið takkar fyri møguleikan at koma við viðmerkingum til uppskotið til broytingar í revsilógini.

Kommunufelagið hevur ikki viðmerkingar til aktuellu innihaldsligu broytingarnar, men Kommunufelagið hevur frammanundan, í sambandi við undanfarnu broytingar í revsilógini, sum sitandi samgonga hevur gjørt í 2016 og 2018, gjørt yvirskipaðar viðmerkingar til hetta lógararbeiðið, og fer Kommunufelagið enn einaferð at vísa til undanfarin hoyringarskriv, dagfest ávikavist 7. juli 2016 og 26. januar 2018, ið bæði eru hjáløgd.

Vegna Kommunufelagið

Dennis Holm, formaður

Eyðun Christiansen, stjóri

Fylgiskjal 9

Kommunufelagið

Løgmansskrivstovan
Tinganes
Postboks 64
110 Tórshavn

Dagfesting
26. januar 2018

Okkara j.nr.
18/00129-2

Málsviðgeri
Jóhan J. Lamhauge

Tygara j.nr.
0617-004/17

**Viðv.: broytingum í revsilógini**

Kommunufelagið skal hervið koma við viðmerkingum til uppskotið um broytingar í revsilógini, ið er sent felagnum til hoyringar.

Kommunufelagið hevur ikki ítøkiligar viðmerkingar til einstøku lógarteknisku broytingarnar, tí til tað er hoyringarfreistin ov stutt, og evnið alt ov týdningarmikið. Hinvegin, útfrá einum generellum og samfelagsligum sjónarhorni, loyva vit okkum at undrast á, at landsstýrið sendir eitt so samfelagsliga týdningarmikið uppskot til hoyringar og samstundis kemur sær at viðmerkja, at uppskotið ikki er rættlisið og at viðmerkingarnar ikki eru heilt lidnar.

Tá seinasta uppskot til broytingar í revsilógini var fyri á sumri 2016, hevði Kommunufelagið yvirskipaðar viðmerkingar, og loyva vit okkum mun at vísa til hesar somu generellu viðmerkingar, sum í stóran mun framvegis sýnast at vera aktuellar. Avrit av nevndu viðmerkingunum er hjálagt.

Vegna Kommunufelagið

Dennis Holm, formaður

Eyðun Christiansen, stjóri

R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn

Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo

Fylgiskjal 9

Kommunufelagið

Løgmansskrivstovan
Lógartænastan
Tinganes
Pokstboks 64
110 Tórshavn

Dagfesting
7. juli 2016

Okkara j.nr.
16/02323-3

Málsviðgeri
Jóhan J. Lamhauge

Tygara j.nr. 0617-001/16

**Viðv.: Uppskoti til broyting í lovbekendtgørelse om straffeloven**

Kommunufelagið skal hervið koma við viðmerkingum til uppskotið til broyting í lovbekendtgørelse om straffeloven, ið er sent stovninum til hoyringar.

Viðmerkingarnar eru ikki av kommunalpolitiskum slagi, men eru ætlaðar sum fakligt íkast í sambandi við arbeiðið at menna føroyska revsirættin.

Uppskotið snýr seg um at broyta kapittul 24. í lógini um forbrydelser mod kønssædeligheden. Vit hava sum so ikki fyrihildið okkum til einstøku broytingarnar í einstøku ásetingunum, men vilja vit viðmerkja, at Kommunufelagið sum heild tekur undir við, at viðurskiftini hjá kynsliga misnýttum verða raðfest og rættarstøðan styrkt.

Til tann málsliga partin av uppskotinum skal viðmerkjast, at uppskotið ber frá av, at tað ikki er rættlisið, sum tað eisini framgongur av viðmerkingunum til uppskotið. Vit fara í hesum sambandi at loyva okkum at vísa á tann stóra týdning, ið tað hevur fyri, hvussu lógarásetingar – serliga revsirættarligar ásetingar - skulu skiljast og tulkast, at lógarásetingarnar eru málsliga greiðar, nágreiniligar og væl frágingnar. Tá talan er um at gera revsilógarásetingar á føroyskum, fara vit harumframt at mæla vit, at setningsbygnaðurin verður hugsaður á føroyskum, soleiðis at ásetingarnar ikki bera brá av at vera týddar orð fyri orð.

Á síðu 6 í almennu viðmerkingunum til uppskotið stendur, at endamálið við lógaruppskotinum er at dagføra revsilógina, so hon verður meira tíðarhóskandi, og at samstundis verður farið undir stóra arbeiði at føroyska revsilógina. Samstundis sæst aðrastaðni í viðmerkingunum (á síðu 8) at roynt hevur í stóran mun verið at gingið atfinningunum á møti, sum hava verið móti verandi ásetingum í 24. kapittli um "forbrydelser mod kønssædeligheden".

Til hetta endamálið er at viðmerkja, at verandi lóg er upprunaliga frá 1939 við seinni tillagingum. Hóast verandi lóg er gomul, og neyðugar tillagingar eru gjørdar leypandi, so er upprunaliga bygnaðurin í lógini stórt sæð varðveittur, og leypandi broytingar eru framdar við atlit at, at revsilógin, saman við rættargangslógini, er ein samanhangandi skipan.

Revsilógin er ein ógvuliga týdningarmikil partur av grundarlagnum undir einum rættarsamfelag. Tí halda vit, at tað átti at verið gjørt meira burturúr at lýst yvirskipað, hvørjar ætlanir eru á revsirættarliga økinum, og at tað átti at verið lýst nærri, um og á hvønn hátt hetta uppskotið er ein partur av eini yvirskipaðari ætlan á økinum.

Fylgiskjal 9

Kommunufelagið

Mett verður ikki, at ein so umfatandi broyting av einum parti av revsilógini eigur at fara fram, uttan at ein yvirskipað ætlan fyrst er fyri, hvussu føroyski revsirætturin skal skipast. Hetta arbeiðið eigur at gerast gjøgnum eina tilgongd í tøttum samstarvi millum lóggávuvald, fyrisiting, og ymsar viðkomandi fakbólkar og áhugabólkar. Tí verður mett, at tað er óheppið, at arbeitt nú verður í brotum, har farið verður undir at liða einstøkar ásetingarnar sundur og flyta og broyta hugtøk, týdningar, revsirammur, fyrningarfreistir o.t., uttan at hetta er verður gjørt sum liður í eini tilgongd, ið er neyvt løgd til rættis frammanundan. Revsilógin sum so eigur at verða endurskoðað undir einum, við einum miðvísum arbeiði, har allir viðkomandi tættir í eini nútíðarhóskandi revsirættarskipan verða gingnir ígjøgnum.

Av viðmerkingunum til uppskotið sæst, at kapittul 24 hevur fingið nýtt heiti, frá "Forbrydelser mod kønssædeligheden" til kynslig brotsverk. Sum skilst er hetta ikki bert ein broyting í heitinum, men eisini í týdninginum av, hvørji áhugamál skulu verjast í revsilógini. Broytingin leggur upp til, at talan nú gerst um brot móti sjálvsavgerðarrættinum og frælsinum og ikki, sum áður, móti siðalæruni. Vit taka ikki støðu til, um hetta er rætt ella skeivt, men vilja viðmerkja, at hetta er eitt dømi um eina grundleggjandi broyting, ið ikki eigur ikki at fara fram, uttan at hon er úrslit av einum breiðum fakligum og politiskum orðaskifti um, hvørji virðir skulu verjast í revsilógini.

Harafturat er galdandi lógin skrivað á donskum eftir gomlum donskum skrivihátti. Tað, at tað nú verður gjørd ein roynd at gera ein part av verandi lóggávu á føroyskum máli, og at ein heilt nýggjur føroyskur partur nú verður settur inn í ein danskan tekst, er ein óheppin arbeiðsháttur, ið ikki eigur at blíva ein góðtikin partur av arbeiðslagnum, tá málsøkir verða yvirtikin.

Vísandi til omanfyri standandi, mæla vit samanumtikið til at steðga á við ætlaðu broytingunum í revsilógini, og í staðin raðfesta arbeiðið við at gera eina heilt nýggja føroyska revsilóg. Tað arbeiðið, ið longu er lagt í hetta uppskotið, kann væl nýtast sum partur av hesum arbeiði.

Vegna Kommunufelagið

Jóhan J. Lamhauge, løgfrøðiligur ráðgevi

R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn

Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo